## Føroyingur millum bestu ensku fjepparnar

**Gøtumaðurin, Hans Jákup á Líknagøtu, er nú í uppskoti hjá BBC sum besti fjepparin hendan mánaðin**

FJEPPARI
*Jákup Mørk*

Hvønn mánað hevur BBC eina atkvøðugreiðslu, har hyggjarar kunnu gera av, hvør skal fáa heiðurin sum ársins áskoðari hendan mánaðin.

Atkvøðugreiðslan snýr seg sjálvandi bert um enskan fótbólt, men tó so. Ein føroyingur hevur kortini sníkt seg uppí greiðsluni, sum er hendan mánaðin.

Sníkt seg er kanska at fara nakað stillisliga við hurðunum, tí Hans Jákup á Líknagøtu gjørdi snøgt sgat barndómsdreymin til veruleika. Blackburn hevur altíð staðið hjarta hansara heilt nær, og fyri at síggja dystirnar hjá felagnum, gjørdi hann ikki mætari enn at flyta til Blackburn, soleiðis at hann á tann hátt kundi vera nærri yndisfelagnum.

Tá hann kom til Onglands, hevði hann einki fast starv í eygsjón, men tað eydnaðist honum at fáa starv á Eawood Park, sum er heimavøllurin hjá Bladkburn, so nú er lag á manni at síggja hvønn tann einasta dystin hjá felagnum.

Hetta hava tey altso eisini lagt til merkis á BBC, har Hans Jákup hesa ferð er ein av trimum, sum kann fáa heiðurin sum besti áskoðarin hendan mánaðin. Atkvøðugreiðslan er á heimasíðuni hjá BBC, og til ber at atkvøða á hesi slóðini: http://www.bbc.co.uk/cgi-perl/polling/poll.pl

# Kappingin verður endurskoðað

**Á fundinum við feløgini, sum verður seinast í november mánaði, verður eitt av málunum fótbóltslandskappingin, og í hvønn mun broytingar kunnu gerast í hesi**



*Eftir at eitt tað mest spennandi kappingarárið nakran tíð er farið í søguna, er FSF longu farið í holt við eftirmetingina av hesum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

LANDSKAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Fyrsta útgávan av Formuladeildini er nú farin aftur um bak. Spenningurin á seinasti leikdegi var øgiligur í botni og toppi, og mett eftir hesum er einki at ivast í, at kappingin var ein brakandi succés.

Spurningurin er tó, hvørt tað var nýggja skipanin, sum førdi til hendan spenningin, ella um tað bara var tilvildin, sum ráddi. Og tað er millum annað ein av spurningunum, sum helst verða viðgjørdir, tá FSF aftur fer at fundast við feløgini.

### Nógvir spurningar at greiða

Í farnu viku vórðu spurnarbløð send øllum spælarum í Formula-deildini, har teir skuldu siga sína hugsan um broyttu kappingina. Hesi spurnarskjøl fara so at verða ein partur av grundarlagnum undir støðutakanini hjá FSF. Ein støðutakan, sum sambært formanninum í Kappingarnevndini, Bjarka Mohr, skal byggja á fleiri fyrilit.

- Nú hevur kappingin í ár verið ein roynd, men fyri tað, um hon hevur verið væleydnað, so er ikki víst, at ongar broytingar skulu gerast.

- Men viðvíkjandi longdini av kappingini, so haldi eg sjálvur, at hon hevur tænt fremsta endamálinum, sum vit settu okkum. Vit søgdu tá, at aðalmálið við broytingini var, at spælararnir skuldu verða enn betri fyri. Steðgurin, har spælararnir hava frí, skuldi minkast, og tað endamálið haldi eg eri rokkið.

- So eru tó fleiri aðrir spurningar, sum vit gjarna vilja hava feløgini at viðgera. Eitt nú hevur verið frammi, at tað skuldu verið fleiri umfør í miðvikuni. Tað hevði stytt kappingina nakað, soleiðis at vit ikki koma alt ov langt út á árið, áðrenn kappingin verður avgjørd.

- Annað er, um tað er neyðugt, at Formula-deildin og 2. deild fylgjast móti endanum. Skal tað framvegis vera so, at næst niðasta og næstovasta liðið í deildunum skulu spæla um upp- og niðurflyting, so er helst neyðugt, at seinastu leikdagarnir fylgjast. Men tað hevur so havt við sær, at fleiri steðgir hava verið í aðru deild. Steðgir, sum ikki vóru neyðugir, um t.d. tey bæði bestu liðini fluttu beinleiðis upp, soleiðis sum tað hevur verið gjørt fyrr.

*Eru hetta broytingar, sum tú fert at mæla til, verða gjørdar?*

- Tað veit eg ikki. Men eg haldi tað er sera umráðandi, at hesir spurningarnir verða viðgjørdir. Sum sagt, so haldi eg avgjørt, at framdu broytingarnar hava tænt fremsta endamálinum, men spurningurin vil altíð verða, hvussu vit kunnu førka okkum enn longur fram á leiðini, staðfestir Bjarki Mohr at enda.

# Nú skal GÍ standa sína roynd

**Hagtølini hava ikki verið við sandoyingum, tá ið teir hava roynt seg í endaspølum um pláss í bestu deildini, og GÍ skal fyri fyrstu ferð royna seg í endaspæli**

ENDASPÆL
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsárið er ikki heilt liðugt enn. Seinnapartin í dag skulu gøtumenn á heimavøllinum vísa, at teir eru komnir fyri seg aftur, eftir at teir leygardagin á Skála vóru í sovornum turbolensi, sum tað næstan ikki ber til at siga frá.

Fótbóltsspælararnir á Sandi mugu halda frí frá dagsins skyldum í dag. Klokkan fýra seinnapartin skulu teir standa klárir í stuttum buksum í Sarpugerði, tá ið Lassin Isaksen fer at bríksla fyri fyrstu ferð.

Spurningurin, sum skal avgreiðiast seinnapartin í dag og leygardagin, er, um tað skal vera GÍ ella B71, sum skal eiga síðsta sessin í FORMULADEILDINI í 2006.

Hetta er fyrsta ferðin, at GÍ er partur í hesum stríðnum. Um tað eydnast gøtumonnum at sleppa óskalaðir burturúr endaspælinum og harvið at halda fram í bestu deildini, so fer Eysturoy næsta ár at eiga seks av tíggju liðum í bestu deildini. Tað er merkisvert.

Hetta er fjórða ferðin, at B71 er partur av endaspælinum. Tríggjar tær undanfarnu ferðirnar hevur tað ikki hilnast væl hjá sandoyingum. Fyrsta ferðin, at B71 tapti endaspæl, var í 2001. Hetta árið endaði B71 næstaftast í bestu deildini. Tá vóru teir í endaspæli móti Skála, sum hevði vunnið næstfremsta plássið í 2. deild - aftanfyri TB sum flutti beinleiðis upp. B71 varð roknað sum favorittur, men Skála vann. Á Sandi løgdu teir seg orduliga á uppflytingarkós, tá ið teir vunnu 4-1. Dysturin á Skála var bara avgreiðslusøk, sum B71 vann 1-0, og tey á Skála fegnaðust um, at teirra felag fyri fyrstu ferð hevði vunnið sær sess í bestu deildini!

Í 2002 endaði B71 næstfremst í 2. deild. Í endaspælinum var EB/Streymur hin parturin. Hesa ferðina var tað so tætt við at eydnast hjá B71, sum tað ikki hevur verið áður og síðani. Á Eiði var úrslitið 1-0 til heimaliðið, og á Sandi vann B71 1-0. So var neyðugt við nýggjari uppgerð, og ta ferðina vann EB/Streymur 3-1.

Í fjør var aftur talan um langt fótbóltsár hjá sandoyingum. Á Sandi vunnu teir 1-0 móti ÍF, men tá ið sandoyingar vóru í Fuglafirði, hilnaðist tað ikki væl. ÍF vann 5-1.

Og so er spurningurin, hvussu tað fer at hilnast hesa ferð. Í summar hava GÍ og B71 dystast í hálvfinaluni í kappingini um Løgmanssteypið. Á Sandi vann GÍ 5-1, meðan tað gekk heilt javnt á í Sarpugerði, har GÍ at enda vann 2-1.

B36, sum endaði næstaftast í 2. deild, og KÍ, sum endaði á øðrum plássi í 3. deild, skulu spæla um síðsta plássið í 2. deild. Fyrri dysturin verður í Klaksvík í dag, og seinna uppgerðin verður í Gundadali leygardagin. Í dag verður tað Petur Reinert, sum verður 23. maðurin á vøllinum í Klaksvík.

Í FSF hava teir gjørt av, at landskappingardysturin í 2. deild millum LÍF og HB, sum varð avblástur í 1. hálvleiki leygardagin, skal spælast nú leygardagin klokkan trý í Leirvík.